# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Verði eg ikki valdur, havi eg ikki verið nóg dugnaligur. Húðaliturin er ikki tað avgerandi (Barrask Obama).*

# Stjórnin verður helst sitandi

**Hóast meirilutin hjá samgonguni er tann minsti, sum hugsast kann, so bendir alt á, at íslendska stjórnin verður sitandi.**

Stjórnarflokkarnir fingu 13 atkvøður færri enn andstøða, men vallógin ger, at samgonguflokkarnir fáa 32 tingmenn og andstøðuflokkarnir 31. Sostatt kann av røttum sigast, at sigurin hjá samgonguni var so tepur, sum hann kundi vera, um tað yvirhøvur ber til at tosa um sigur. Í prosentum fingu samgonguflokkarnir 48,3 prosent av atkvøðuinum og andstøðan 48,4.

Tann stóri samgonguflokkurin, Sjálfstæðisflokkurin, hevði eitt gott val. Hann fekk tríggjar tinglimir afturat og hevur nú 25. Haraftur-ímóti fekk hin samgonguflokkurin, Framsóknarflokkurin, ein frammaná. Flokkurin misti fimm tingmenn og hevur nú bara sjey, og tað var júst nóg mikið til at tryggja samgonguni meirilutan í Altinginum.

Umboð fyri teir báðar samgonguflokkarnar høvdu fund um støðuna í gjár. Undan valinum søgdu leiðandi fólk í Framsóknarflokkinum, at fekk flokkurin eitt so vánaligt útslit, sum meiningakanningarnar spáddu, so fór flokkurin neyvan at halda fram í stjórnini.

Flokkurin gekk eitt sera vánaligt úrslit, og floksformaðurin sjálvur varð ikki afturvaldur. Kortini vænta íslendskir fjølmiðlar, at stjórnin verður sitandi. Tað hevur ljóðað, at samgongan møguliga fór at bjóða einum av andstøðuflokkunum uppí, men tað hendir neyvan kortini.

24 nýggj andlit eru í Altinginum, og 20 av teimum 63 tinglimunum eru kvinnur. Undan valinum vóru tær 19.



*Geir H. Haarde verður helst sitandi sum forsætisráðharri.*

# Húðaliturin ikki avgerandi

**Skuldi tað hent, at demokratiski flokkurin vrakar Barrack Obama, so hevur tað einki við hansara húðalit at gera. Tað heldur hann í hvussu er sjálvur.**

Demokratiski flokkurin í USA kann koma í eina sjáldsama støðu, tá hann skal taka støðu til, hvør skal umboða flokkin á forsetavalinum næsta ár, tí tey bæði sterkastu valevnini víkja frá tí vanliga.

Verður Hillary Clinton uppstillað, kunnu amerikanararnir fyri fyrstu ferð nakrantíð fáa eina kvinnu til forseta, og verður Barrack Obama uppstillaður, kunnu amerikanararnir fáa sín fyrsta svarta forseta.

Mong halda, at júst húðaliturin kann vera tað, sum forðar Obama at vinna, men tað heldur hann ikki sjálvur. Í samrøðu við sjónvarpið ABC í gjár segði Obama, at hann fer ikki at geva húðalitinum skyldina, verður hann vrakaður sum forsetavalevni hjá demokratunum.

-Eg hugsi ikki so nógv um hatta, men eg veit, at tað eru veljarar, sum ikki vilja hava ein littan forseta, segði Barrack Obama.

### Hevur verju

Blaðið New York Daily News skrivaði um vikuskiftið, at Secret Service hevur sett fólk at halda eyga við Barrack Obama alt samdøgrið, tí vandi kann vera fyri, at fólk við rasistiskum hugsjónum fara at gera seg inn á hann. Blaðið nevnir, at á onkrum kjaksíðum á alnótini hava rasistar umrøtt spurningin at geva Obama somu lagnu sum Abraham Lincoln, ið bleiv myrdur í 1865, tí hann ætlaði at geva teimum svørtu í USA atkvøðurætt.

*Barrack Obama.*



## STUTT SAGT

### Grannar berjast

Í gjár vóru harðir bardagar millum afghanskar og pakistanskar stjórnarhermenn á marknaleiðini millum tey bæði londini. Afghanskar keldur siga, at bardagarnir vóru teir harðastu í fleiri áratíggju, og at fleiri túsund sivilfólk eru farin athjákpa stjórnarhermonnunum ímóti figgindanum. Afghonsku keldurnar vilja vera við, at tað vóru pakistanar, sum byrjaðu bardagarnar, men tað siga pakistanar ikki. Pakistanska herleiðslan sigur, at afghanskir hermenn fóru at skjóta eftir fleiri marknastøðum hjá pakistanska herinum, og at sjey afghanskir hermenn lótu lív í skotbardaganum, sum tók seg upp aftaná.

### Kongur deyður

Kongurin í tí lítla oyggjaríkinum Samoa, Malietoa Tanumafili II, doyði um vikuskiftið, 94 ára gamal. Malitua bleiv kongur í Samoa, tá landið fekk sjálvsstýri frá Ný Sælandi í 1962. Í sambandi við deyða kongs segði ný sælendski forsætisráðharrin, Helen Clark, at Malitua hevði stýrt Samoa við vísdómi og innliti. Malitua var kongur í samfull 45 ár. Bara teilendski kongurin, Bhumibol Adulyadej, og bretska drotningin, Elisabeth II, hava sitið longri á trúnuni enn Mailtua. Bhumibol hevur verið kongur í 61 ár, og Elisabeth hevur sitið á bretsku trúnuni í skjótt 55 ár. Samoa er einar 1.400 fjórðingar norðan fyri Ný Sæland.

### SPD størstur

Sosialdemokratiski flokkurin í Týsklandi vann landspartavalið í Bremen um vikuskiftið. Flokkurin fekk millum 37 og 38 prosent av atkvøðunum, teir kristiligu demokratarnir í CDU fingu góð 25 prosent, og Tey Grønu fingu góð 16 prosent. Bæði SPD og CDU høvdu afturgongd, men roknað verður við, at SPD fer at skipa landspartastjórn saman við øðrum av hinum flokkunum. Bremen er tann minsti av teimum 16 týsku landspørtunum, og har hevur verið lutfalsliga stórt arbeiðasloysi.